

– Uttan borgarar í kommununi, so doyr hon út, staðfestir borgarstjórin í Hvannasundi, Júst Poulsen

# Grundøki eru altíð tøk

**Eftir at steðgur var komin í húsabyggingina í Hvannasundi, er nú vent í holuni. Í summar verður í øllum førum farið undir bygging av trimum sethúsum. ý Fáa vit ikki nýggjar borgarar í kommununa, so er eingin at taka við eftir okkum, sigur borgarstjórin, Júst Poulsen.**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hvannasund:** – Åh, er tað tú! Ja, vit hava fund nú týskvøldið. Og -tá kemur tað fyri og so avgreiða vit tað. Ein maður hevur ringt á kommunukontórið við einum fyrispurningi til borgarstjóran.

Hann er spentur eftir at vita, hvussu verður við umsókn hansara um byggiloyvi.

Ætlan hansara er at byggja sær eini sethús her í Hvannasundi. Og nú ynskir hann eitt svar frá kommununi um, hvussu verður við hesum.

Hann hevur borgarstjóran, Júst Poulsen í telefonini hesa løtuna. Borgarstjórin er sjálvur á kontórinum hvønn hósdag, og tá liggur fyri at fáa eitt greitt svar.

– Nær tú fært boð?! Vit hava fund týskvøldið. So tað verður mikudagin. OK?!

Jú, hesin maðurin er nøgdur við svarið. Nú kann hann fara undir endaligu fyrireikingarnar til arbeiðið at seta føtur undir egið borð her í bygdini.

Hann er kortini ikki tann einasti sum gongur við slíkum hugsanum. Ikki færri enn tríggir mans ætla at fara undir bygging av egnum sethúsum í summar.

Bygdaráðið í Hvannasundi hevur í kvøld sín fyrsta regluliga fund í nýggja árinum. Og tá er avgreiðslan av hesum eina byggiloyvinum eitt av málunum á skránni.

### Altíð øki tøk

Hóast Hvannasund liggur nærhendis Klaksvík, har nógv arbeiðspláss eru, so var tað eitt langt tíðarskeið har einki sethús varð bygt í kommununi, sum fevnir um bygdirnar báðumegin Hvannasund.

– Frá 1991 og heilt fram til 2002 varð einki sethús bygt her. Tað var ikki so gott, sigur Júst Poulsen

Borgarstjórin kann í dag tíbetur staðfesta, at síðani tá er alt viðvent. Nú er hinvegin stórur byggiáhugi í Hvannasundi:

Í løtuni eru tvey sethús í gerð, og í næstum verður farið undir bygging av trimum - møguliga fýra ý sethúsum aftrat, helst longu í summar.

– Vit eiga nøkur grundøki tøk, og vit kunnu eisini altíð útvega grundøki, tá fólk biðja um tað.

– Tað vísir seg ikki at vera nakar trupulleiki at fáa øki eftirkomarar - tað er sum eini hjún uttan børn, sigur hann.

Kommunan hevur eisini lagt seg eftir at hava góðar umstøður til barnafamiljurnar, bæði til børnini í og undir skúlaaldri.

Kommunan hevur ætlanir um at byrja eina útbygging og umvæling av skúlanum á Fossánesi í ár.

Í kommununi finst eisini ein dagstovnur, sum heldur til í teimum húsunum sum vórðu gjørd í stand fyri nøkrum árum síðani.

### FAKTA

Eitt sindur um Hvannasund
Vinnulívið í kommununi er nærum alt fiskivinna og útróður.
Havnaviðurskiftini eru góð.
Í 1963 varð flakavirki bygt í Norðdepli. Síðani bergholini vóru gjørd í 1967, er samvinnan við Klaksvík vorðin sera stór. Koyrdar verða bæði virkaðar og óvirkaðar vørur millum kommunurnar.
Í 1974 kom byrging um Hvannasund, so Borðoy og Viðoy vórðu samanbundnar. Rutubáturin út til Svínoyar og Fugloyar siglir út frá Hvannasundi.
Í 1985 varð nýggjur skúli bygdur á Fossánesi, og her ganga nú øll børnini í kommununi í skúla til og við 7. skúlaár. Skúlabørnini í framhaldsdeildini verða koyrd til Klaksvíkar.

(Kelda: Hvannasund.fo)



*Stórur áhugi er fyri at seta búgv á Strondum. 14 grundøki eru longu bíløgd*

## Stórur áhugi fyri grundøkjum

**Strendur:** Hóast mong kanska vilja halda, at Strendur liggur avsíðis, so eru strandingar ikki samdir í tí.

Tað vísir seg, at áhugin fyri at byggja í bygdini er rættiliga stórur. Og henda byggiáhugan ætlar kommunan sær ikki at lata gleppa av hondum.

Kommunan hevur nógvar ætlanir fyri framman, og ein teirra er at leingja tann eina vegin í bygdini. Samtykt er at leingja Fløtuvegin og at gera 24 útstykkingar í Lánni. Í løtuni verður arbeitt við at ogna økið.

– Stórur áhugi er fyri grundøkjum í bygdini. Longu nú eru 14 bíløgd, upplýsir borgarstjórin, Malena Thomsen.

## 390.000 tons til fremmand fiskifør

**Fiskiskapur:** Uppgerðin yvir útlendsku veiðuna í fjør vísir, at í alt vórðu veidd 389.400 tons í føroyskum sjógvi.

Av hesum er - ikki óvæntað - mest veitt av svartkjafti, og eru tað tey íslendski skipini, sum hava veitt eina góða helvt av teim 365.000 tonsunum.

Hinvegin so hava eingi skip úr Írlandi, Portugal, Estlandi og Japan veitt nakað í føroyskum sjóøki í fjør. Alt árið í fjør var heldur einki langasporl, brugdulivur ella prikkafiskur veitt av útlendingum í føroyskum sjóøki.

**sb.**

## Nógv virksemi á havnaøkinum

**Sørvágur:** Hetta seinasta árið hevur kommunan gjørt nógvar ábøtur á havnaøkinum, og er ætlanin at halda fram við hesum hetta komandi árið.

Millum hesi arbeiðini er at umvæla molahøvdið við innsiglingina til bátahylin, eins og ætlanin er at betra um umstøðurnar hjá egningini á landi. Peningur er játtaður at gera hesi arbeiðini í ár.

Upplýst verður annars, at nógv virksemi hevur verið á havnaøkinum. Í fjør tók Landingarmiðstøðin ímóti 6.300 tonsum og flakavirkið Vestís tók ímóti og virkaði 1200 tons.

Kommunan ætlar eisini at reinsa bátahylin í ár fyri sand og annað tilfar. Long tíð er gingin, síðani hetta varð gjørt seinast, men nú er so ætlanin at gera tað aftur.

**sb.**